Johan Dahl
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um serfrøðinganevnd at kanna havbit og skeljaaling í Føroyum, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hevur landstýrismaðurin sett serfrøðingarnevndina, ið skal kanna møguleikan fyri havbiti og skeljaaling, sum eitt samt Løgting hevur biðið landsstýrismannin um at gera?
2. Hvussu gongur við arbeiðinum at kanna møguleikan fyri havbiti og skeljaaling, sum samgonguskjalið ásetir?

Viðmerkingar

Í løgtingmáli nr. 128/2017 samtykti eitt samt Løgting tann 20. apríl 2018, eftir tilmæli frá einari samdari Vinnunevnd, at heita " ... á landsstýrið um at seta niður bólk av serfrøðingum til at kanna og gera frágreiðing um, hvussu Føroyar kunnu gera seg galdandi innan havbit av laksi, og hvussu farast kann undir skeljaaling í Føroyum og grundað á frágreiðingina leggja fyri Løgtingið frágreiðing um hetta."

Viðmerkingarnar frá ein samdum Løgtingi vóru m.a., at tað er avgerandi fyri Føroyar at hava fjøltáttaðar vinnumøguleikar, og tí skuldi arbeiðast við hesum, tí vit landafrøðiliga liggja so væl fyri, at tað er eyðsæð, at her eru møguleikar, sum mugu troytast til tess at tryggja, at Føroyar kunnu verða eitt uppaftur ríkari samfelag til fyrimunar fyri allar føroyingar.

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu, dagfest 14. september 2019, verður eisini lagdur dentur á hetta, tí har stendur m.a.: "Møguleikarnir fyri aling á landi skulu eisini troytast, og arbeiðast skal eisini við møguleikum fyri havbiti og aðrari aling, so sum tara- og skeljaaling."

Havbit og skeljaaling kundi blivið eitt gott ískoyti til føroyska búskapin og eisini skapt nýggj arbeiðspláss. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 13. november 2020

Johan Dahl